J|Á|S|P|I KETLAR

Teir vælumtóktu ketlarnir
*eru á goymslu*



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð. Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**

MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



**Føroya størsta úrval av**
**PAKKITILFARI**
**úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

Vit útvega eisini:

- Plastbakkar
- Pakkibond, tape
- Merkir, etikettir
- Knívar
- Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
- Ymisk tól til ídnaðin
- Reingerðisevnir
- Tilsetningsevnir
- Plattar
- Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

FARPACK

*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*


Ferðavinnan í Norðoyggjum søkir hervið eftir:

# Leiðara fyri Kunningarstovuna

Í samráð við býráðsumsitingina hevur nevndin fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum gjørt av at umskipa virksemið á Kunningarstovuni.

**Bygnaðurin:**
Sambært reglugerð, ið er góðkend av Ferðaráð Føroya, er Kunningarstovan undirløgd Ferðavinnuni í Norðoyggjum, sum verður stuðlað av Ferðaráð Føroya, kommununum í Norðoyggjum o.ø. Við tilvísing til nevndina fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum hevur leiðarin ábyrgd av dagliga rakstrinum.

**Uppgávurnar** hjá umskipaðu Kunningarstovuni, sum hevur opið mánadag-leygardag, verða m.a. at:

1) Samskipa tilboð og tiltøk á ferðavinnuøkinum og kunna ferðafólk um hesi
2) Samskipa vinnu- og handilslívið í økinum til ein meiri miðvísan leiklut
3) Samskipa hátíðarhald, vitjanir o.a. innan PR-økið fyri býráðið/-umsitingina

**Høvuðsuppgávur** leiðarans verða:

- sum dagligur leiðari og ábyrgdarhavandi at fremja endamál Kunningarstovunnar
- í samstarvi við nevndina fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum at leggja framtíðar ætlanir og at virka fyri, at hesar verða fylgdar
- at sjónliggera og menna tilboðini hjá Ferðavinnuni í Norðoyggjum
- at skapa eitt breiðari samstarv millum vinnu- og handilslív eins væl og myndugleikar í økinum
- at samstarva við býráðsumsitingina og røkja ávísar uppgávur fyri hana
- at menna fíggjarliga grundarlagið undir Ferðavinnuni í Norðoyggjum og viðvirka til neyva fíggjarstýring

**Vit sóknast eftir persóni, ið:**

- kann virka í góðum samstarvi við onnur
- er ágrýtin og fyrikomandi
- hevur góðan málførleika
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir at ganga á odda og fyrisita/leiða
- hevur kunnleika til nýtslu av EDV

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Starvið, sum verður sett skjótast gjørligt, er lønt í 20. lønarflokki smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Landsstýrið, sum fyri fulla arbeiðstíð gevur eina byrjunarløn upp á kr. 18.259,40.

**Fleiri upplýsingar** fáast við at vend sær til Trónd Fuglø, formann í nevndini, tlf. 456532 ella 216532.

**Umsóknir** verða at senda til: Ferðavinnuna í Norðoyggjum,
C/O Tróndur Fuglø, form.
Jørundsgøta 41, 700 Klaksvík

í seinasta lagi mánadagin 16. oktober 2000.

**Ferðavinnan í Norðoyggjum**

## Skrivstovunæmingur

Søkt verður eftir skrivstovunæmingi at byrja beinanvegin. Krav til umsøkjaran er FHS, HH e.l.

Sendi umsókn saman við prógvum innan 6.10.2000 til

**P/F Polyplast**
Postboks 1305
110 Tórshavn

P/F Polyplast er virkið ið framleiðir rør til vatnleiðingar og kaðalverju. Harafturat selja vit alt innan rør og rørdeildir. Á virkinum arbeiða 4 fólk.

Hevur nú nakrar spurningar ert tú vælkomin at ringja á tlf. 317633.

POLYPLAST




**Skorsteins-sóparin**

**er við til at halda umhvørvið reint**

Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar

**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass



JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi

**Tlf. 22 33 11**
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn


## Frá Strandferðsluni um leið 7

Suðuroyarleiðin leygardagin 30. september

**Smyril** siglir soleiðis:
kl. 07.00 Vág-Tórshavn
kl. 09.30 Tórshavn-Vág
kl. 17.15 Vág-Tórshavn
kl. 20.00 Tórshavn-Vág

Smyril siglir ikki á Tvøroyri hendan dag.

*Bussar koyra í samband við Smyril.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

## Fáa tit ikki blaðið leygardagar?

Vinarliga ring tel. 214118, um tú sum haldari ikki fært leygardagssosialin. Boðar tú ikki frá innan kl. 15.00 leygardag, hava vit ikki møguleika fyri at bera leygardagsblaðið út.

Tíðindablaðið sosialurin


**Nýggjar TANNPROTESUR**

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16




**Toll- og Skattstova Føroya, Eysturoyar Øki**

## Starv á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur:** Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, toll, skatt, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum verður settur, skal hava roknskaparligan førleika, og skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, eitt nú merconom, HD o.a., og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða** eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving,

- klokkuskipan við flextíð, og
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðs umhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at seta seg í samband við Ingolf Lamhauge, økisstjóra, tlf. 448588.

**Umsóknir:** Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til

**Toll- og Skattstovu Føroya,**
Eysturoyar Øki,
Postboks 225,
600 Saltangará

**innan 15. oktober 2000.**

**Um stovnin:** Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri,í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 16 fólk.

## Dagtilhaldið Luffustova

Vit møtast aftur týsdagin 3. okt. kl. 15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**

Heimarøktin
Suðuroy

## Sjúkrasystir

Søkt verður eftir avloysara fyri heimasjúkrasystir at arbeiða 24 tímar um vikuna, frá 15. oktober 2000 til 31. juli 2001.

**Krav til umsøkjaran:**
Útbúgving sum sjúkrasystir við góðkenning frá danska heilsustýrinum. Ynskiligt er at umsøkjarin hevur kunnleika til heimasjúkrasystraarbeiði og eldrarøkt.

**Setanartreytir:**
Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jeannu í Lágabø, økisleiðara, tlf. 373907.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 13. oktober 2000 kl. 14.00


## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53



*Lýsið í* **sosialinum**


## Frá Strandferðsluni um leið 40

## Ternan 1

Meðan Ternan 1 er á sleipistøð frá mánamorgni 2. okt. koyrir

**Leið 450 Snarbussurin**
eftir lýstu ferðaætlanini.

Kl. 06.30 Toftir-Tórshavn
Kl. 16.20 Tórshavn-Toftir

STRANDFARASKIP LANDSINS


**TILBOÐ**

÷10% av stálvaskum

÷20% av øllum kranum



Sosialurin - 311820

*Vit hava eisini stórt úrval av baðirúmsmøblum.*
*Tilboðið heldur fram mánaðin út!*

**VVS-HORNIÐ**
**Lágpríshandil**
Landavegur 2 - 100 Tórshavn - Tel. 318023 - Fax 310963



**Konfirmatións-klæðir til hansara**



*fáast í*

**Kallkyn**

*Vágsbotnur - tlf. 31 62 06*